

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 11 - 2011

# Mærsk sinnað at tosa um oljuavtaluna

A.P. Møller - Mærsk hevur einki ímóti at tosa við donsku stjórnina, sum nú ætlar sær at taka avtaluna frá 2003 um oljuna í Norðsjónum til eftirmetingar. - Vit hava skilt, at stjórnin fer at virða gjørdar avtalur, og vit vilja fegin hjálpa við viðkomandi upplýsingum til eina eftirmeting, sigur Mærsk í einari viðmerking til ætlanina hjá stjórnini. Mærsk leggur í sama viðfangi dent á, at í árunum frá 2004 til 2010 hevur felagið goldið meiri enn 60 prosent í skatti av avlopinum, og at hetta er í samsvari við tað, sum staturin tryggjaði sær, tá verandi avtala varð gjørd. -Hægri oljuprísur hevur givið størri inntøkur og harvið meiri skatt og hevur soleiðis verið til gagns fyri bæði fyritøkur og statin, skrivar A.P. Møller - Mærsk í viðmerkingini.

